## Torført at endurtaka

Svenska stórheitstíðin í altjóða hondbólti frá 1990 til 2002, sum gav 13 heiðursmerki á rað, verður torfør at endurtaka. Í Eysturríki tapti Svøríki allar tríggjar innleiðandi dystirnar í EM-endaspælinum. Núverandi landsliðsvenjarin, Staffan Olsson, sum var við tey gyltu árini, er tó bjartskygdur: – Fáa vit góða breidd aftur á liðnum við fleiri altjóða sterkum spælarum, fáa vit eisini úrslitini, sigur hann.



## Ávirkar HM á heimavølli

At Svøríki longu í innleiðandi umfarinum reyk úr EM-endaspælinum, kann kosta bæði ítróttarliga og fíggjarliga. Svensk hondbóltsfólk stúra fyri, at tá Svøríki um eitt ár er vertur fyri HM-endaspælinum í Malmö, Lund, Göteborg og Skövde, fer hetta at speglast aftur í viknandi áhuga og atgongumerkjasølu. Vánaliga EM-úrslitið í Eysturríki kann eisini koma at ganga út yvir styrkimetingina.

# Pólland og Frakland hava lagt seg á odda

### Kekkia stóð fyri sensasjónini í gjár, tá teir vunnu 37-35 á Slovenia




Heri Simonsen

Fronsku heimsmeistarnir og olympisku meistarnir vunnu 24-22 á Týsklandi í millumbólki 2 í gjár. Hálvleiksstøðan var 12-10 til Frakland. Eitt skiftið var Frakland á odda við sjey málum, og tað stóð á gomlum nøglum ímóti dystarenda, men einaferð vísti málverjin, Thierry Omeyer sítt virði við fleiri klassabjarginum.

Í løtum vísti Nikola Karabatic eisini sítt gamla støðið, sum kann geva vónir um, at tað sannførandi franska spælið ikki er so ræðuliga langt burtur.

Pólland vísti sera gott spæl ímóti Spania, tá póllendingar vunnu ein sannførandi 32-26 sigur á spaniumonnum. Pólland var á odda 13-9 í steðginum. Pólland byrjaði dystin væl, og teir vóru alla tíðina frammanfyri ta heldur tama spanska liðið. Aftur í dag stóð Slawomir Szmal, sum ein livandi múrur í pólska málinum, og átti hann sín stóra lut í pólska sigrinum.

### Kekkiskur stórskjútti

Kekkia stóð fyri sensasjónini, tá teir í gjár vunnu 37-35 á Slovenia, sum annars hevur staðið seg sera væl í hesari kappingini. Stórskjúttin, Filip Jicha var høvuðsorsøkin til kekkiska sigurin. Hann skjeyt heili 12 mál í dystinum í dag.

Kekkia fór undan slovenum í fyrra hálvleiki, og í steðginum var Kekkia á odda heili 21-12. Petr Stochl í kekkiska málinum stóð eisini væl í málinum, og hann átti eisini sín stóra lut í sigrinum. Slovenia ressaðist ikki, fyrr enn ímóti endanum av dystinum, men tá var klokkan farin undan teimum, og nærri enn 35-37 kom slovenska liðið ikki.

# Wilbek trýr upp á tað

### Hóast stóra niðurtúrin ímóti Íslandi, so trýr danski landsliðsvenjarin enn uppá, at Danmark kann vinna EM-gull




Heri Simonsen



Danski landsliðsvenjarin, Ulrik Wilbek, er bjartskygdur undan millumumfarinum

Danmark fekk veruliga oyruni í íslendsku maskinuna leygarkvøldið. Danska dagblaðið, BT, fór so langt sum at skriva, at »danskarar vóru rundbarberaðir av íslendingum«, og at íslendingar veruliga »góvu dønum eina hondbóltsfrálæru«.

Men hóast tann greiða ósigurin, so trýr danski venjarin, Ulrik Wilbek, framvegis uppá, at Danmark kann røkka hálvfinaluni. Ein hálvfinala, sum veruliga hevði verið í eygsjón, um Danmark hevði vunnið á Íslandi.

### Góð dystarskrá

– Tað sær bara gott út í millumspælinum. Vit hava Russland og Noreg í teimum báðum fyrstu dystunum. Eg spurdi spælararnar í skiftirúminum, um nakar teirra trúði uppá, at vit ikki kunnu vinna á Russlandi og Noregi. Har var eingin, og tað eru altso tvey lið, vit eiga at kunna vinna á, staðfestir Ulrik Wilbek.

– Vit hava Kroatia í síðsta dystinum, og tað er veruliga heppið. Tá hava kroatarnir vónandi spælt seg í hálvfinaluna, og tá er ikki víst, at motivasjónin hjá teimum er so stór. Vit hava verið í hesi støðuni fyrr og hava vunnið okkum í hálvfinaluna alíkavæl. Tað kunnu vit gera aftur.

# Noreg bardi seg víðari

### Leingi sá svart út, men tað eydnaðist norðmonnum at enda at knógva Ukraina




Heri Simonsen

Noreg hevði sítt hoyggj við Ukraina, men tað eydnaðist okkara grannum í eystri at vinna ein tepran 31-29 sigur á Ukraina. Ukraina var á odda 16-14 í hálvleikinum, og norðmenn høvdu stórar trupuleikar við at koma í gongd, umframt at Stian Vatne helst er liðugur í EM, tí hann fekk ein skaða í knæið.

Norski landsliðsvenjarin, Kristian Kjelling, fegnaðist um sigurin, men var tó misnøgdur: – Vit spældu sera illa. At vit vunnu hendan dystin, er eitt undur, segði hann.

Fyri hondbóltsfjepparar í Føroyum er eitt spennandi millumumfar í væntu, tí Noreg endar saman við Kroatia og Russlandi í bólki saman við Danmark, Íslandi og Eysturríki í millumspælinum.

Kroatia vann 30-28 á Russlandi, og tað merkir, at Kroatia tekur fýra stig við sær í millumumfarið. Noreg fær tvey stig við sær, meðan Russland einki stig fær við, tí stigini ímóti Ukraina falla burtur.



Norska landsliðið mátti stríðast fyri sakini, áðrenn sigurin á Ukraina var veruleiki